**TIL SØLU**
Skærm 19" kr. 550,- PC – god til hjemmekontoret & Breiðband. PIII, 550Mhz, 384 Mb Ram, 12GB HD, 17" skærm m/højtt, netkort. Inkl. Windows & MS Office & div. spil. kr. 1950,- ISDN Modem. kr. 150,- ISDN telefon, Ascom Eurit22 kr. 150,-
*Tlf. 320828*

**TIL SØLU**
Góður 17" skermur av merkinum Samsung. Ikki flatskermur, til sølu fyri 500 kr.
*Tlf. 220156*

**GÓÐ TELDA TIL SØLU**
Windows XP, 2,66 ghz, 512 mb DDR ram, góðan 19" skerm, netkort, modem, hátalara, tráleyst tastatur og mús, brennara. Nógv sera góð forrit og spøl fylgja við. Teldan er sera væl egna til spøl og internet. Til sølu fyri 8500 kr.
*Ring 214789*

**PS 2 SPØL TIL SØLU**
3 spøl til sølu: Moto GP kr. 300,- Bionicle kr. 400,- Wormblast kr. 200,-
*Tlf. 321370 ella 273020*

**TOSHIBA TELDA**
við 17" skermi, vælegnað til skúlabrúk, er 4 ára gomul, prísur 5.000,- kr.
*Tlf. 213577/333877*

**LOGITECH KNAPPABORÐ**
og mús (tráleyst), óbrúkt, til sølu fyri 500 kr.
*Tlf. 213577*

**LITE-ON 52X CD-R BRENNARI**
Ein dygdar lite-on 52x brennari til sølu. Hann brennur við 52x og lesur fløgur við 52X. Verður seldur á uppboðsølu á www.keypsla.com
*255909 / ahh@kallnet.fo*

**P4 BOTNKORT ASROCK P4VT8+**
Eitt sera gott Pentium 4 botnkort til sokkel 478 processarar. Hevur SATA, RAID og allar hentleikar. Verður einans selt tí eg uppgraderi - Ger kvettið!Verður selt á uppboðsølu á www.keypsla.com
*255909 / ahh@kallnet.fo*

**ASUS RADEON 89550SE 128 MB**
Eitt sera dygdargott grafikkort. Ger kvettið! Hevur DDR ram og 400Mhz RAM DAC 8x AGP og hægsti upploysningur er 2048x1536 pixels. Er eitt DirectX 9.0graffikkort. Verður selt á uppboðsølu á www.keypsla.com
*255909 / ahh@kallnet.fo*

## Tónleikur

**HÁTALARAR**
2 studio power hátalarar 250 w bíliga til sølu.
*Tlf. 226689*

**KAWAI**
elektro chord orgul bíliga til sølu.
*Tlf. 312093*

**NIKON TIL SØLU**
Eitt AF-ED Nikkor 80-200mm 1:2.8D objektiv til sølu. Bert brúkt privat. Prísur: gev eitt boð.
*Tlf. 211231*

**LANEY VC-50 FORSTERKARI**
Til sølu fyri 5.500,-. Nýprísur. Uml. 9.000,- Meira um forsterkaran: www.harmony-central.com/Guitar/Data/Laney/VC50-01.html Skriva til mín á: derhard@kagsaa.dk, ella ring:
*+45 21939794*

**TIL SØLU**
Klaver til sølu.
*Tlf. 721698, Johan*

**HARMONIKA TIL SØLU**
Ein lítið brúkt Bugari Armando Supercosotto knappharmonika til sølu um hóskandi boð fæst. Tøtt og væl hildin.
*Tlf. 220265*

## Út- & Sjónvarp

**SAMSUNG 28" 100 HZ SJÓNVARP**
Tað hevur eitt øgiliga lekkurt snið og er silvurlitt. Tað er 28 tummar stórt og hevur autovolume sum garanterar at tú fært sama ljóð niveau óansæð hvørja kanal tú velur. Verður selt sum auktión á www.keypsla.com
*255909 / ahh@kallnet.fo*

**ÆLDRE FJERNSYN**
TO-R fra ca. 50-erne m/radio og grammofon, på hjul. I pæn stand sælges. Alt under 10.000 kr. ingen interesse.
*Tlf. 448745/741675*

## Ymiskt

**TIL SØLU**
Rør til solarium merki UV.A.TL.100W-10R
*Ring 222184*

**LOPPUMARKNAÐUR – REYÐI KROSSUR FØROYA**
Loppumarknaður verður leygardagin 5. mars, kl. 10.00-14.30 í hølum felagsins í Vágsbotni. Tikið verður móti smálutum, reinum og góðum klæðum mikukvøld frá kl. 19-21.
*Reyði Krossur Føroya*

**TIL SØLU**
Til sølu eru 5 náttúru málaríir.
*Tlf. 505021*

**SJÁLVHJÁLPARBÓLKAR**
Børn og ung, sum hava mist foreldur ella systkin, kunnu melda til sjálvhjálparbólk nú. Anna S. Dalsgaard tlf. 319552/519552 ella e-mail
*janna@kallnet.fo*

**DYKKARAÚTGERÐ**
bíliga til sølu, er í góðum standi, selist samlað.
*Tlf. 228997*

**HYGG HER!**
ein Sony Ericsson T630 við camera til sølu. Nýprísur 2.400 kr. Ring og hoyr nærri á
*tlf. 250908*

**FRYSTIRÚM**
Wiesmann frystirúm við tilhoyri, 4 ára gamalt, í sera góðum standi, til sølu. Hædd: 2,15 m, longd 2,70 m. og br. 2,10.
*Tlf. 457144/222788*

**JA, NÚ VERÐUR TAÐ SO**
ja, tað verður páskareggja tombola við 600 páskareggum í Glæmuni í Kvívík sunnudagin 27. februar kl. 16.00 stundisliga. Møguleiki er at vinna 2 føroysk páskaregg við at skriva navn og telefonnr. á nitturnar og so verður drigið millum allar nitturnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*KFUM skótarnir í Kvívík*

**BLÓÐGEVAR Í SUÐUROY**
Aðalfundur verður í TB-húsinum mánakvøldið 28. februar kl. 20.00.
*Nevndin*

**GOTT TOMBOLA**
Gott tombola við lutaseðlasølu verður í Gamla Skúla á Viðareiði leygardagin tann 26. februar klokkan 15.00
*9. flokkur Eystan Múlan*

**PÁSKAREGGJATOMBOLA**
Tombola við 500 góðum páskareggum verður í Kollafjarðar Skúla leygardagin 5. mars kl. 1300.
*Kollafjarðar Ítróttarfelag*

**TIL SØLU**
Høsnahús til sølu.
*Tlf. 312537*

**BRENNIOVNUR**
(stoypijarn) bíliga til sølu.
*Tlf. 312093*

**HALLÓ**
Stuðulskonsert til frama fyri Danmarkarferð verður í Missiónshúsinum á Glyvrum leygarkvøldið 12. mars 2005 kl. 20.00 við Magna Christiansen og Kirkjukósinum í Vestmanna. Høvi verður at keypa lutaseðlar áðrenn konsertina. Drigið verður á konsertini. Eisini verður drekka. »Komi og havi eitt hugnaligt kvøld« Øll eru hjartaliga vælkomin.
*FKUM-skótarnir á Glyvrum*

**SPINNING SÚKKLA**
Er tað nakar, sum hevur eina nýmótans súkklu (spinning) at selja mær.
*Tlf. 583431/220845*

**ÓBRÚKT VINDEYGU**
Bíliga til sølu. Mát: B:H: 211,5x135 cm. 2 stk., 108x135 cm 6 stk., 56,5x135 6 stk.
*Tlf. 447908*

**GALLARÍ VÁGSBOTN**
fer at hava stóra sølaframsýning á torginum í SMS 7. til og við 12. mars. Um nakar hevur hug at lata gamlar lutir ella málningar inn at selja, so ring 314293 ella 214293.
*Gallarí Vágsbotn*

**MODELSKIP TIL SØLU**
Leivur Øssurson. 152 cm. langur, stødd 1:38, Norrøna (gamla Norrøna), 129,5 cm. long, stødd: 1:50.
*Tlf. 274557*

**TIL SØLU**
Hoyggj og fóður til sølu.
*Tlf. 756356*

**HYGG HER!**
Kjallara trappa ynskisr til keyps fyri ein sámuligan prís. Høgrasving, std. 100 cm. b. 260 cm. h.
*Tlf. 222794*

**GARAGUHURÐ TIL SØLU**
5 sektiónir b. 3.20 h. 3.50.
*Tlf. 228347*

**BORÐTENNISBORÐ**
ynskist til keyps, ringið
*421182 ella 226459*

**EITT KVALITETS COMPACT**
Flash kort, ið einans verður selt tí at nýggja kamaraðisum eg skal keypa ikki brúkar CF kort. Pláss er fyri 256MB av data á kortinum. Tvs. at tað er pláss fyri nógvum myndum í høgari góðsku. Riggar saman við eitt nú Canon IXUS 500. Verður selt á uppboðsølu áwww.keypsla.com
*255909 / ahh@kallnet.fo*

**YNSKIST TIL KEYPS**
Brenniovnur/peis ynskist til keyps, nýtist ikki at vera nýggjur. Vinarliga ring á
*tlf. 509791*

**STUÐULSKONSERT**
verður í missiónshúsinum á Glyvrum leygarkvøldið 12. mars kl. 20.00 við Magna Christiansen og kirkjukórinum í Vestmanna. Høvi verður at keypa lutaseðlar áðrenn konsertina. Drigið verður á konsertini. Eisini verður drekka »Komið og havi eitt hugnaligt kvøld«. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*KFUM-skótarnir á Glyvrum*

**TIL SØLU**
Garasjuhurð í 5 sektiónum og rúti í. Mát b. 3,30 x h. 3,50 fyri kr. 7.000,-
*Tlf. 583749*

**YMIST TIL SØLU**
Kamera: Spejlrefleks kamera, Nikon F5, Nikon blitz SB-28, spiralkabel SC-17 m.TTL, Nikon Circular Polar, Nikon R60, Sigma Obj. 17-35mm D Aspherical, Manual, fik stor service juni 2003. Kr. 14.000.
Herrerur, exklusiv TAG HEUER Monza Automatic. Hvid skive m. sort læderrem. Ikke brugt. Org. æske. Købt juli 2002, kr. 12.000.
Herrerur TAG HEUER, batteri dykkerur 200 mtr. model WT 1110, sort skive med dato og flot lænke. Kr. 4.500.
Herrerur Breitling Automatic Superocean Proff. Dykkerur 1524mtr. Meget flot mørkeblå skive med gummirem. Kr. 7500,-
Mares dykkermaske Maschera Lirica Tech/Nero Tech-black kr. 400,-
Snorkel Technisub des.303440 US Pat. kr. 100,-
Mares svømmefødder Plana avantitre blå, str. 42-43, kr. 450,- i alt 950,-
Salomon Inliner, str. UK10, EUR45. 4 hjul á 76mm 78A Salomon X-tr, ALU-skinne Powerarch 60 max 270mm DR85, virkelig god kvalitet, meget lidt brugt m få ridser, kr 800,-
Badminton ketsjere: Babolite satelite Kevlar 90 gr. Som ny, 600.-
Yonex Carbonex8, den kendte, er som ny, pris 150,-
Pro Kennex Ceramic 858 kr. 100,-
Klapramme, HANSA, fejler intet. Mål: 36x31 cm. Kr. 100,-
Herrerur Casio C-801 Digital med lommeregner, dato, stopur, læderrem. 200,-
*mobil 271827*

# Hervør, Høgni og hini

**Skúlabókaútgáva**
*tíðindaskriv*

Seinna arbeiðsheftið til lesibókina Hervør, Høgni og hini er komið. Arbeiðsheftið er tætt knýtt at lesibókini og er gjørt soleiðis, at næmingarnir í mest møguligan mun eru førir fyri at loysa upp-gávurnar sjálvir.

Rannveig Hovgaard og John Næs Berg, lærarar í Hvalba, hava skrivað og Olivur við Neyst og Hannis Egholm hava myndprýtt. Arbeiðshefti 2 er einnýtisbók, 68 síður og kostar 68,00 kr.

# Smyril Line noyðist at leggja oljuavgjald á ferðaseðlarnar

**Áhaldandi høgi oljuprísurin hevur við sær, at Smyril Line nú eisini noyðist at leggja oljuavgjald á ferðaseðlaprísin. Felagið ætlaði at sleppa undan hesum, men so leingi oljuprísurin liggur omanfyri 35 dollarar fyri Brent tunnuna á marknaðinum í London, er neyðugt at hava oljuavgjaldið í gildi**

**oljuavgjald**
*tíðindaskriv*
*frá Smyril Line*

Smyril Line hevur bíðað sum longst eftir, at oljuprísurin skuldi lække, men áhaldandi høgi prísurin ber við sær, at felagið nú er tvungið at leggja oljuavgjald á ferðaseðlarnar.

Onnur reiðarí og flogfeløg løgdu longu í fjør heyst oljuavgjald á ferðaseðlarnar, men Smyril Line valdi at fylgja gongdini og bíða.

Nú ber kortini ikki til at bíða longur, og felagið noyðist at taka hetta stigið.

Øll ferðandi við Norrönu skulu gjalda 60 krónur í oljuavgjaldi fyri einvegis ferðaseðlar og 120 krónur í avgjaldi fyri tvívegis ferðaseðlar.

Leiðslan í Smyril Line harmast støðuna, men vónar, at ferðafólk skilja, at tað er neyðugt at taka hetta stigið.

# Toskur legst á línu, tá hann er svangur

**Hetta vóru millum evnini í fyrilestri, sum Petur Steingrund helt í Klaksvík fyri stuttum. Partur av fyrilestrinum verður endurgivin niðanfyri**

**Toskafiskiskapur**
*Petur Steingrund,*
*Fiskirannsóknarstovan*

**Nøgd av fiski í havinum**

Fiskirannsóknarstovan hevur í mong ár fylgt við gongdini í fiskastovnunum við at gera stovnsmetingar. Tær byggja á veiðitøl, og á yvirlitstrolingar hjá rannsóknar-skipinum »Magnus Heinason«. Vit vita tí við rímiligari vissu, hvussu nógv hevur verið til av toski, hýsu og upsa undir Føroyum seinastu umleið 40 árini.

Fiskirannsóknarstovan hevur eisini fylgt við fiskiskapinum hjá línuskipum við at kanna veiðidagbøkur. Tær vísa, at fiskiskapurin við línu (nøgd av fiski per 1000 húkar) kann vera sera ójavnur frá einum ári til annað.

Vanliga er tað gott samsvar millum fiskiskapin við línu (dagbøkur) og nøgd av toski í havinum (stovnsmetingar). Tað er ikki so løgið, tí jú meira fiskur er í havinum, jú meira kemur á línuna.

Hinvegin kann tað viðhvørt vera nógv at fáa við línu, tá lítið er til av toski, til dømis í 2003. Orsøkin er, at línan fiskar meira effektivt summi ár enn onnur.

**Veiðievni hjá línu**

Effektiviteturin (veiðievnini) er lutfallið millum fiskiskapin við línu (nøgd per 1000 húkar) og nøgd av toski í havinum (stovnsmetingar). Tá línan fiskar best, fiskar hon tríggjar ferðir meira tosk, enn tá hon er ringast. Hetta kemst av, at toskur betur tekur á línuna, tá hann er svangur.

Her kemur umhvørvið inn í myndina. Føðin hjá toski er vanliga krabbadjór og fiskur. Tey liva av djóraplankton ella av smádýrum á botni, sum aftur liva av plantuplankton (»gróðri«). Gróðurin kann vera sera ymiskur frá einum ári til annað. Tey árini, tá gróðurin er góður, er nóg nógv til av náttúrligari føði og toskurin tekur ikki so væl. Tá gróðurin er vánaligur, er lítið til av føði, og toskurin legst á línuna. Veiðitrýstið (veiða mótvegis nøgd av fiski í havinum) fylgir veiðievnunum hjá línu, tí línan stendur jú fyri mesta fiskiskapinum eftir toski.

**Sveiggj í fiskiskapi**

Lívið hjá toskinum er tí ymiskt. Tey árini, tá lítið er til av føði, er tilgongdin av smáfiski lítil og toskurin veksur seint. Tá er veiðitrýstið eisini stórt, og tá minkar toskastovnurin skjótt. Hinvegin er alt gott hjá toskinum, tá gróðurin er góður, og toskastovnurin veksur skjótt (sí talvu). Sama er galdandi fyri hýsu. Hetta skapar tey stóru sveiggini í fiskiskapinum við línu.

| | Vánaligur gróður | Góður gróður |
|---|---|---|
| Tilgongd av smáfiski | Lítil | Stór |
| Vøkstur hjá toski | Lítil | Stórur |
| Veiðitrýst | Stórt | Lítið |
| Toskastovnurin | Minkar skjótt | Veksur skjótt |